UTTAN ÚR HEIMI

# Hevndin verður eirindaleys

**Ísrael fer at hevna palestinsku atsóknirnar sunudagin, sum kostaðu níggju mannalív, og hevndin verður eirindaleys, sigur stjórnin**



*Bussurin, sum ein sjálvmorðsbumbumaður sprongdi eina bumbu í sunnudagin, varð fullkomiliga oyðilagdur av spreingingini*

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Ísraelska stjórnin svór í gjár, at teir palestinsku felagsskapirnir, sum halda fram við at søkja at málum í Ísrael, skulu fáa av at vita. Serliga verður hugsað um felagsskapirnar, sum skipa fyri sjálvmorðsbumbuatsóknum, og í kunngerðini hjá stjórnini stóð, at hevndin fyri hesi álopini verður eirindaleys.

Teir níggju ísraelsmenninir, sum doyðu sunnudagin, vóru í einum bussi, sum ein palestinskur sjálvmorðsbumbumaður sprongdi í luftina við einari bumbu. Tilburðurin var tætt við býin Safed har norðuri í Ísrael. Bussurin var á veg úr býnum Haifa, og fleiri hermenn vóru millum ferðafólkini.

Stutt eftir spreingingina ringdi ein maður til fronsku tíðindastovuna AFP. Maðurin segði seg umboða felagsskapin Hamas og segði, at tað vóru teir, sum høvdu skipað fyri atsóknini við Safed.

ES og USA fordømdu alt fyri eitt atsóknina.

Aftur í gjár gjørdu vápnaðir palestinar um seg. Útvarpið hjá ísraelska herinum segði, at ein maður hevði skotið eftir einum ísraelskum bili nærhendis Ramallah á Vestara Áarbakka. Í bilinum vóru niðursetufólk, maður, kona og tvey børn. Maðurin og konan doyðu, og bæði børnini, sum vóru fimm ár og seks mánaðir, vórðu særd.

### Tátta takið

Ísraelski herurin kunngjørdi í gjár, at hann fer at tátta takið um fimm palestinskar býir afturat til tess at forða fleiri fleiri atsóknum.

– Havandi í huga tað, sum er hent í seinastuni, hava vit gjørt av at avmarka rásarúmið hjá fólkinum í Jenin, Nablus, Tulkarm, Qalqilya og Ramallah, stóð í kunngerðini frá herinum. Býirnir Betlehem og Hebron sleppa undan teimum herdu tiltøkunum.

Í síðstu viku loystu ísraelsmenn nøkur av bondunum, sum teir hava havt palestinararnar í, og m. a. varð fráboðað, at palestinar, sum arbeiddu í Ísrael, skuldu sleppa aftur til arbeiðis. Í kunngerðini frá herinum í gjár stóð, at ætlanin er at halda fram við at linna tiltøkini í býum, har tað er friðarligt.

# Fer ikki til Bagdad

Formaðurin í vápnaeftirlitsliðinum hjá ST, sviin Hans Blix, tekur ikki av innbjóðingini frá iraksku stjórnini um at koma til Bagdad at tosa um, hvussu eftirlitið kann takast uppaftur.

Hans Blix sigur, at hann fer ongan veg, fyrr enn Saddam Hussein, forseti boðar frá, at hann er til reiðar at lata ST-eftirlitsmenninar taka arbeiðið uppaftur uttan forðingar.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, hevur sagt, at talan verður ikki um at senda eftirlitsmenn aftur til Irak undir teimum treytum, sum stjórnin í Bagdad hevur lagt við.

# Milliónir norðurkoreanar hóttir av hungursneyð

**Fáa ST og aðrir hjálparfelagsskapir ikki fleiri túsund tons av mati innan ein mánað, verða fleiri milliónir norðurkoreanar hóttir av hungursneyð**

HUNGUR
*Árni Joensen:*

Alheims matvørustovnurin WFP bað í gjár altjóða samfelagið um hjálp til at fyribyrgja einari álvarssamari hungursvanlukku í Norðurkorea.

ST hevur fleiri ferðir fyrr biðið um hjálp til at forða einari vanlukku í Norðurkorea. ST sigur, at tað er neyðugt at fáa til vega umleið 130.000 tons av mati til umleið seks milliónir fólk í Norðurkoprea, sum hava so lítið til matna, at tey hava altjóða hjálpina fyri neyðini.

Asia-talsmaðurin hjá alheims matvørustovninum, John Powell, sigur, at eydnast tað ikki at fáa gevaralondini at veita meiri stuðul skjótt, noyðist felagsskapurion at raðfesta, hvør skal fáa hjálp, og hvør ikki skal fáa.

– Tað kann hugsast, at hjálparfólkini koma í tað støðu, at tey kunnu bara hjálpa børnunum og teimum gomlu, og at lítið og einki verður til hini, sigur talsmaðurin.

# ETA søkir aftur at frítíðarplássum

**Tvey fólk doyðu, tá ein bumba brast í spanska býnum Santa Pola sunnukvøldið**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Spanska løgreglan segði í gjár, at tey bæði, sum doyðu av bumbuspreingingini, vóru ein 57 ára gamal maður og ein átta ára gomul smágenta. Meiri enn 25 onnur fingu skaða.

Bumban lá í bili, sum stóð uttan fyri løgreglustøðina í býnum Santa Pola og stutt frá einari bussstøð, har nógv fremmand ferðafólk ofta eru savnað. Tað eru fólk, sum vitja kenda frítíðarstaðið Alicante á sponsku miðjarðarhavsstrondini, sum plaga at nýta busstøðina.

Spanska løgreglan sigur, at atsóknin líkist atsóknum, sum baskiski loysingarfelagsskapurin ETA hevur skipað fyri, og blaðið El Mundo skrivaði í gjár, at tað var ETA, sum legði bumbuna í bilin í Santa Pola.

ETA hevur ofta fyrr hótt við at søkja at sponsku frítíðarplássunum um summarið til tess at ræða fremmand ferðafólk frá at koma til Spania at halda summarfrí. Á tann hátt ætlar felagsskapurin at raka ferðavinnuna, sum er ein ógvuliga týðandi inntøkukelda hjá spanska samfelagnum.



Kári Djurhuus:

# Skal uppbyggja eitt fjølmiðlanetverk

*Kári Djurhuus er settur í starv sum PR-maður hjá Smyril Line. Hann skal taka sær av øllum fjølmiðlaarbeiðnum í sambandi við nýggju Norrönu, og harafturat skal hann uppbyggja eitt fjølmiðlanetverk fyri stovnin*

*Savnsmynd*



**Kári Djurhuus er settur í starv á Smyril Line sum PR-maður. Hann skal taka sær av øllum arbeiðnum, sum hevur við fjølmiðlar at gera, og er hansara uppgáva fyrst og fremst at uppbyggja eitt fjølmiðlanetverk**

MIÐLAR
*Ingrid Bjarnastein*

Nýggja Norröna er vorðin nógv umtalað og viðgjørd í teimum ymsu fjølmiðlunum. Stórur áhugi er fyri nýggja skipinum, og Smyril Line hevur sett ein PR-mann at taka sær av fjølmiðlunum í sambandi við nýggju Norrönu. Og hesin maðurin eitur Kári Djurhuus.

– Uppgávan hjá mær er fyri at nøkta tann fjølmiðlatørvin sum er, og so harafturat skal eg upparbeiða eitt fjølmiðlanetverk fyri stovnin, sigur Kári Djurhuus, sum í løtuni er staddur í Bergen, júst í hesum ørindunum.

– Eg skal skapa kontaktir soleiðis, at Smyril Line kann venda sær til onkran, tá teir koma við onkrum nýggjum. Sum er nú, so er tað soleiðis, at tá okkurt nýtt er á skránni, veit stovnurin ikki, hvagar hann skal fara við tí.

Arbeiðið hjá Kára er sostatt at skapa sambond við fjølmiðlarnar. Bæði í Føroyum og uttanlands. Og í løtuni er Kári Djurhuus í Bergen, har hann er holt við at víðka um fjølmiðlaringin.

– Nú havi eg arbeitt í fleiri ár á Christiansborg, so eg havi hitt fleiri fjølmiðlafólk her úr Norðanlondum, so nú arbeiði eg við at finna teir journalistarnar, sum eru áhugaðir í Føroyum og í júst hesum viðvíkjandi Norrönu, greiðir Kári Djurhuus frá.

Áhugin fyri nýggju Norrönu vísir seg at vera stórur.

– Ein jarnbunki, sum stendur niðri í Lübeck, selur kanska ikki so nógv í løtuni, men vit hugsa longur fram í tíðina. Um tað, sum fer at henda komandi hálva árið og fram eftir. Við einum fjølmiðlanetverki er tað lættari at fara út aftaná, og fáa sambond við tey røttu fólkini, sigur Kári.

Kári vísir eisini á, at ein noyðist at byrja tíðliga fyri at fáa tey røttu sambondini í lag.

Fyribils er Kári Djurhuus settur sum PR-maður til einaferð inn í næsta ár. Men sjálvur sigur hann, at tað kann væl vera, at tíðarskeiðið verður styttri. Alt eftir, hvussu væl arbeiðið gongur.

# Norröna sjósetast um góðar tvær vikur



*Nýggja Norröna er veruliga farin at taka skap. Her eru tey ovastu dekkini sett á hana*

SKIPASMÍÐ
Ingrid Bjarnastein

Tað gongur framá við byggingini av nýggju Norrönu, og hetta fer veruliga at merkjast nú. Tann 24. august skal Norröna sjósetast, og fer hon tá við fullari ferð út á sjógv.

– Arbeiðið gongur sum tað skal, sigur Kári Djurhuus, talsmaður fyri Smyril Line. – Og tað, eg havi frætt, so verður hon liðug til tíðina.

Og nú ber eisini til at fara upp á brúnna, tí brúgvin varð sett upp klokkan 6.00 í gjáramorgunin, men tíverri eru ongar myndir frá hesum.

Nýggja Norröna verður liðug í umleið februar og kemur hon til Føroya mánaðarskifti februar-mars 2003.

# Sera væleydnað laksa- og sølutorg í Runavík

**Leygardagin varð skipað fyri stórum laksa- og sølutorgi í Runavík. Básar, telt, pallur, pavilliongir, borð og stólar vóru sett upp á høvuðsvegnum í miðbýnum í Runavíkini**

BÝARLÍV
*Jóhan Jacobsen*



Veðrið var av tí besta, so ein rúgva av fólki var og vitjaði tiltakið, sum varð sera væleydnað.

Langur leygardagur var eisini hendan dagin í Runavíkini, og hetta serliga tiltakið, sum er tað fyrsta av sínum slag í Runavík, var frá middegi og út til klokkan fimm. Út á dagin komu fleiri og fleiri fólk at vitja forkunnuga laksa- og sølutorgið.

Høvuðsvegurin í miðbýnum var stongdur, og riggaði hetta væl. Á sølutorginum vóru básar settir upp við ymsum sølulutum: frukt, blómur, klæðir og eisini var loppumarknaður.

Pannukøkur og vaflur vóru at fáa á útikafé, sum pensionistarnir stóðu fyri. Feskur laksur var eisini at fáa til sølu, og hoyrdist at nógv varð selt.

Av stóra laksaborðinum, sum kokkurin Poul Rustin stóð fyri, fingu nógv sær ein góðan bita. Hetta var enntá ókeypis.

Eisini var undirhald við tónleiki frá eini dupult kvartett og barnasangur við Duritu, Ester, Drós, Beintu og Tanju og einum sangbólki úr Kelduni. Eisini sungu Jónsvein og Birgir nakrar sangir.

Stigtakarnir, sum eru Kunningarstovan, Handilsmiðdepilin og Runavíkar Kommuna, vóru sera vælnøgdir við tiltakið. Til dømis vóru nógv fleiri fólk og vitjaðu torgið í ár, enn í fjør, men tá var veðrið ikki heilt til vildar. Ætlanin er at víðka um sølutorgið til ein størri uttandura marknað, sum ein eitt nú sær sunnanfyri.

Tiltakið er eisini ein partur av arbeiðnum fyri at betra um trivnaðinum í býnum, og væntað verður við eins góðari undirtøku næsta ár. Eisini vænta fyriskiparnir at nógv fleiri handlar úr býnum fara at luttaka á torginum næstuferð.